# Ferðafólkini keypa postkort og frímerki

Sum alla aðrastaðni, so merkja tey á posthúsinum, at summarfrítíðin nærkast. Men í mun til hjá so mongum øðrum, so merkja tey summarið sum eina friðarliga tíð. Serliga síðsta vikan í juli og tær fyrstu í august eru friðarligar, tí tá halda øll virkir og allar fyritøkur summarfrí, so posturin er ikki tann sama hesa tíðina.

Men tað merkir ikki, at tey onki hava at gera hjá Postverk Føroya. Ferðafólkini vitja nógv á posthúsinum um summarið, og er tað serliga á Posthúsinum í Miðbýnum, sum merkir mest til ferðafólkini. Meginparturin av ferðafólkunum umborð á teimum stóru ferðamannaskipunum, sum koma til landið, koma niðan í Posthúsið í Miðbýnum, og har er tað serliga frímerkir og postkort, sum tey selja til tey ferðandi, og sum tey síðani senda av landinum.























